## Fogh eigur at fara frá

Enn er ógreitt, um Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, verður aðalskrivari í NATO ella ikki, men stendur tað til Danska Fólkaflokkin eigur hann at fara frá sum stjórnarleiðari, sjálvt um hann ikki fær starvið í Bruxelles. Í DF halda tey, at tað er neyðugt at endurreisa Vinstra, men at tað gerst ikki uttan formansskifti, soleiðis at Lars Løkke Rasmussen skal taka við eftir Anders Fogh Rasmussen. Kristian Thulesen Dahl, sum er formaður í tingbólkinum hjá DF, sigur við Ritzau, at verður Fogh ikki aðalskrivari, fara fólk at hava ta uppfatan, at hann heldur fram sum forsætisráðharri, tí at NATO vildi ikki hava hann.



## Haarde út og X inn

Geir H. Haarde, sum herfyri fór frá sum íslendskur forsætisráðharri, stillar ikki upp til tað komandi altingsvalið, og í gjár var hann á røðarapallinum í Altinginum og segði farvæl og takk. Hann segði, at hann hevði kent tað sum ein framíhjárætt at sita 22 ár í Altinginum, umframt at hann hevur verið bæði fíggjarmálaráðharri og forsætisráðharri. Sama dag sum Geir H. Haarde segði farvæl, fekk Altingið ein heldur sjáldsaman gest, sum ætlandi verður verandi. Tað er førarahundurin X, sum skal hjálpa tí blinda tingmanninum Helga Hjörvar í Samfylkingini at finna vegin í tinghúsinum eins væl og uttanfyri.

# Á posthúsið tá tað passar tær

**Á posthúsinum í miðbýnum í Havn kanst tú nú senda brøv og pakkar, júst tá tað passar tær best. Og sum nakað heilt nýtt fáa fólk sms-boð, tá pakkar eru klárir at avheinta**

TÆNASTA

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Hvør man ikki hava roynt at koma júst fimm minuttir ov seint á posthúsið við einum pakka, sum helst skuldi avstað sum allarskjótast? Ella í heila tikið argast inn á, at upplatingartíðirnar hjá posthúsinum eru so ólagaligar hjá vanligum arbeiðsfólki?

Júst slíkar tvørleikar verður bøtt munandi um, nú posthúsið í miðbýnum í Havn lat upp aftur í morgum við eini nútímans sjálvavgreiðslu.



*Í nýggja rúminum við postsmogum kunnu fólk skjótt eisini heinta pakkar, sum tey hava fingið boð um umvegis sms-boð*

Mynd: Jens K.Vang

### Nýggj posttøka

„Posttøkan“ er heitið á nýggju sjálvavgreiðsluni, har tú kanst senda brøv og pakkar umframt keypa frímerki og brævbjálvar.





*Nýggja posttøkan er er sera løtt at brúka og kann avgreiða bæði keyp av frímerkjum og pakkasendingar*

Mynd: Jens K. Vang

Hóast møguleikarnir við nýggju posttøkuni eru nógvir, er hon sera løtt at brúka. Skalt tú til dømis senda ein pakka, leggur tú hann bara á eina vekt og tastar inn navnið á landinum, har hann skal sendast. Á einum telduskíggja sæst nú vekt og kostnaður, umframt at tú kanst velja, um pakkin skal sendast við skipi ella flogfari. Síðani rindar tú við gjaldskorti og koyrir pakkan í eina stóra boks við síðuna av posttøkuni. Hevur tú brúk fyri eyka frímerkjum ella brævbjálvum, kunnu hesi eisini keypast í posttøkuni.

Dagligi leiðarin á posthúsinum, Svanbjørg Manai, fegnast um nýggju posttøkuna, sum fer at gera tað munandi lagaligari hjá fólki at brúka posthúsið. Møguleiki verður at koma til posttøkuna til klokkan 22 á kvøldi.

### Sms-boð um pakka

Nú posthúsið í miðbýnum letur upp aftur, er høli við postboksum eisini broytt. Inngongdin er nú beint við høvuðsdyrnar, og munandi betri pláss er eisini í hølinum.

Sum nakað serstakt eru nakrar serliga stórar postboksir nú eisini í hølinum. Hesar skulu brúkast til pakkar, sum fólk sjálvi kunnu heinta. Við einum sms-boðum hava tey nevniliga frammanundan fingið boð um, at ein pakki er komin og nú kann avheintast við at brúka eina ávísa kotu.

Hóast sjálvavgreiðslan á posthúsinum nú er munandi víðkað, merkir tað ikki, at brúk verður fyri færri starvsfólki, sigur Svanbjørg Manai.

- Í fyrsta umfari fer eitt fólk at taka sær av at vegleiða í sjálvavgreiðsluni. Annars eru ikki ætlanir um at gera broytingar í starvsfólkahópinum í sambandi við nýggju sjálvavgreiðsluna, sigur Svanbjørg Manai.

Hon leggur afturat, at Post Danmark hevur brúkt hesar posttøkurnar í eina tíð við sera góðum royndum. Tí hevur Postverk Føroya sett líknandi posttøkur upp á posthúsunum á Óðinshædd, í Saltangará, í Klaksvík og í miðbýnum í Havn sum lið í at gera avgreiðsluna meir kundavinarliga.

# Fiskimannafelagið fær betri pláss

**Í næstum fer Føroya Fiskimannafelag undir at byggja upp aftur sunnara partin av bygningin, har felagið heldur til, so skrivstovan fær munandi betri pláss**

BYGGING

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Tíðiliga í morgun sóðust maskinur byrja at bróta niður sunnaru helvt av bygninginum hjá Føroya Fiskimannafelag á Bursatanga, har handilin hjá Samvinnufelagnum og kaffistovan Carlsborg hava hildið til.

Sámal Poulsen, nevndarlimur í Fiskmannafelagnum, sum stendur fyri arbeiðinum sigur, at av fyrstan tíð var ætlanin at umvæla gamla bygningin.

- Eftir at hava kannað hann nærri vísti bygningurin seg at vera so illa farin av fýri, at tað ikki loysti seg at umvæla hann. Tí hava vit valt at taka hann niður og heldur byggja hann upp av nýggjum, sigur Sámal Poulsen.

### Nýggja lyftu

Nýggi bygningurin verður í fýra hæddum, tað vil siga ájavnt tann partin, har Fiskimannafelagið nú hevur skrivstovu. Síðani er ætlanin at víðka verandi skrivstovu við allari ovastu hædd á nýggja bygninginum.

Men Sámal Poulsen fegnast ikki bara um nógva plássið, sum skrivstovan tá fær.

- Vit eru eisini serliga fegin um at ein lyfta verður í nýggja bygninginum, sum ger, at fólk í koyristóli kunnu koma heilt upp á fjórðu hædd eisini. Tað ber ikki til sum er, og tað er jú rættiliga ótíðarhóskandi, sigur Sámal Joensen.

Eftir ætlan skal niðasta hædd í nýggja bygninginum verða liðug um ólavsøkutíð. Nær bygningurin verður heilt liðugur er ilt at meta um, men arbeiðið verður gjørt sum skjótast, sigur Sámal Poulsen.

Væntandi fer bygningurin at kosta einar fimm til seks milliónir krónur, tá hann stendur heilt liðugur.



*Í morgun var farið undir at bróta sunnara partin av bygninginum hjá Føroya Fiskimannafelag á Burstanga niður. Bygningurin skal nú byggjast upp aftur í fýra hæddum*

Mynd: Jens K. Vang